# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*- Forsetin gav okkum boð um at eta okkara fíggindar, eisini ST-hermenn, so fólk skuldu ræðast okkum*

*(Joseph Marza)*

# Gav monnum sínum boð um at eta ST-hermenn



*Fyrrverandi liberiski forsetin Charles Taylor er ákærdur fyri fleiri brot ímóti mannaættini*

*Mynd: Reuters*

**Ovastin fyri drápsliðunum hjá fyrrverandi forsetanum í Liberia, Charles Taylor, sigur, at forsetin bað menn sínar eta ST-hermenninar**

Charles Taylor, sum var forseti í afrikanska landinum Liberia, situr í hesum døgum í einum rættarhøli í niðurlendska býnum Haag, tí altjóða krígsbrotsmannad ómstólurin hevur ákært hann fyri at hava framt ellivu brotsverk ímóti mannaættini undir borgarakrígnum í Liberia.

Altjóða dómstólurin hevur fleiri vitni í málinum. Eitt teirra er Joseph Marzah, sum var ovasti fyri teimum serligu drápsliðunum, sum høvdu til uppgávu at beina fyri øllum, sum vóru ímóti forsetanum. Tað hevur ljóðað, at forsetin gav sínum monnum boð um at eta teir mótstøðumenninar, sum fullu, og tann spurningin fekk Joseph Marzah í rættinum í gjár:

- Bað Charles Taylor tykkum eta fólk, spurdi ákærin.

- Ja, tað skuldu vit gera, fyri at fólk skuldu ræðast okkum, svaraði Marzah. Fyrrverandi ovastin fyri liberisku drápsliðunum greiddi sinniliga frá, at mannaátið stóðst av hevndarhugi og svongd. Teir hermenn, sum ikki gjørdu eftir boðum forsetans, vórðu skotnir, segði Joseph Marzah.

Hann greiddi frá, at tað vóru ikki bara heimligir fíggindar, sum endaðu sum føði hjá drápsliðunum, men at friðarvarðveitandi hermenn úr Nigeria og ST-hermenn liðu somu lagnu.

CNN sigur, at Joseph Marzah verður mettur sum eitt sera týðandi vitni í rættarmálinum ímóti Charles Taylor, og at hnn skal hava játtað at vitna eftir at hava fingið vissu fyri, at hann og hansara næstu fáa neyðuga verju.

# ES er ikki nóg sosialt

**Í ES-londunum liva 17 milliónir fólk undir korum, sum eru niðan fyri fátækramarkið**

Búskapur og arbeiðsmarknaður eru høvuðsevnini á toppfundinum hjá ES-londunum, sum byrjaði í gjár. Undan fundinum hava leiðararnir fingið eina frágreiðing frá ES-nevndini, sum sigur, at tey bæði seinastu árini eru seks milliónir arbeiðspláss komin afturat í Evropa.

Evropeiski løntakarafelagsskapurin ETUC heldur lítið um tað talið. Felagsskapurin vísir á, at talið á etimum, sum arbeiða parttíð, er vaksið sera nógv í Evropa, og at tey seinastu 10 árini er talið á teimum, sum hava parttíðarstarv, vaksið 10 milliónir. Men tølini vísa eisini, at 20 prosent av teimum, sum eru í parttíðarstarvi, eru tað, tí tey hava ongan møguleika at fáa fulltíðarstarv, sigur ETUC og leggur afturat, at ES er ikki nóg sosialt.

Felagsskapurin var á fundi við ES í gjár, og har varð víst á, at 31 milliónir løntakarar í ES-londunum hava eina løn, sum liggur beint oman fyri fátækramarkið, og at 17 milliónir hava eina inntøku, sum er niðan fyri fátækramarkið.

- Tað verður sagt, at tann evropeiska arbeiðsmegin skal laga seg eftir broyttum umstøðum fyri at møta altjóða avbjóðingum. Men royndirnar vísa, at skerd rættindi geva ikki fleiri møguleikar. Ístaðin fyri fáa vit fleiri ótrygg og vánalig arbeiði, og tað er skaðiligt fyri tey góðu arbeiðsplássini. sigur aðalskrivarin í ETUC, John Monks, við Reuters.

ETUC varð stovnað í 1973 og umboðar fakligar felagsskapir í 36 evropeiskum londum.



*Slovenia hevur formansskapin í ES í løtuni. Her heilsar slovenski forsætisráðharrin, Janez Jansa, italska forsætisráðharranum, Romao Prodi, tá toppfundurin byrjaði í gjár*

*Mynd: AP*

## STUTT SAGT

### 15 ár fyri kynsligan ágang

Dómsvaldið í Kambodja hevur dømt ein týskan mann 15 ára fongsul fyri kynsligan ágang ímóti einari 13 ára gamlari gentu. Tann 61 ára gamli Walter Munz varð tikin í síðsta mánað, tá løgreglan kom fram á hann og gentuna á einum gistingarhúsi. Undir rættarviðgerðini kom fram, at gentan Walter Munz hevði gjørt seg inn á gentuna fleiri ferðir, og umframt fongsulsdómin skal hann rinda gentuni 7.000 amerikanskar dollar í sekt. Walter Munz helt uppá, at hann var ósekur, men læknakanningar staðfestu, at gentan hevði verið fyri kynslingum ágangi.

### Al-Qaeda rænt ferðafólk

Ein deild hjá yvirgangsfelagsskapinum al-Qaeda hevur burturflutt tvey eysturríksk ferðafólk í Tunesia. Burturflytararnir hava boðað algersku myndugleikunum frá, at tey bæði ferðafólkini sleppa ikki leys, fyrr enn teir limir í al-Qaeda, sum sita í fongsli í Tunesia og Algeria, eru latnir leysir. Burturflytararnir hava almennakunngjørt seks myndir av teimum báðum eysturríksku ferðafólkunum, og sambært Reuters er talan um Wolfgang Ebner og Andreu Kloiber. Sambært tíðindastovuni hava eysturríksku myndugleikarnir váttað, at tey bæði eru horvin í Tunesia.

### Kanna Chávez

Amerikanska uttanríkisráðið kannar, um hald er í skuldsetingunum um, at Venesuela hevur hjálpt kolombisku uppreistrarrørsluni FARC við pengum. Kolombiska stjórnin sigur seg hava fingið fatur á skjølum, sum vísa, at FARC hevur fingið 300 mió. dollarar úr Venesuela eftir boðum frá landsins forseta, Hugo Chávez. Amerikanski uttanríkisráðharrin, Condoleezza Rice, segði í gjár, at USA fylgir gjølla við, hvat kemur fram í málinum.